ítróttur

Nr. 38 • leygardagur • 23. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógv stendur upp á spæl

**VÍF kann leygardagin taka enn eitt stórt fet móti FM-heitinum, tá tær vitja í Vági, meðan Kyndil og Sóljan bæði royna eftir stigum í niðurflytingarstríðnum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Tríggir dystir eru á skránni í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið, og felags fyri allar er, at ein møgulig úrtøka úr hesum hevur avgerandi týdning. Antin í heiðursmerkjastríðnum ella í stríðnum um at halda lív í fyrstudeildartilveruni.

### Trupult í Vági

Í Vági er VÍF uttan iva favorittur at vinna triðja dystin móti VB í ár. Tó at tær hvørja ferð eru favorittar, tá tær spæla, so skerst ikki burtur, at júst í útidystinum móti VB, so vildu tær úr VÍF helst verið heitið fyri uttan hesaferð.

Eitt er, at tað altíð er torført hjá øllum liðum at koma til Vágs, men júst hjá VÍF hevur hesin dysturin verið truplari enn allir aðrir seinnu árini. Ikki minst munnu tær minnast fyrsta dystin í inniverandi kappingarári, tá tað akkurát eydnaðist teimum at bjarga tveimum stigum, og har til skal eisini leggjast, at fyri VB kann ein møguligur sigur hava risa stóran týdning í stríðum um tey heiðursmerkini, sum eru niðanfyri gullið. Og so skal minnast til, at VÍF eisini spældi ein uppvísingardyst hóskvøldið.

### Lív og silvur

Hinir báðir dystirnir hava til felags, at meðan annar parturin stríðist um silvur, stríðist hin fyri lívinum.

Á Giljanesi tekur Sóljan ímóti Stjørnuni, og tó at Stjørnan er stórfavorittur, so skal ein sigur als ikki takast fyri givið her. Sóljan ætlar sær uttan iva at gera Kyndli kynstrið eftir og taka stig frá Stjørnuni, sum tó er betri mannað hesaferð, enn tær vóru móti Kyndli. Eisini er talan um gamla heimavøllin hjá Simonu Dziugyte, sum nú skjýtur síni mongu mál fyri Stjørnuna, og so er bara spurningurin, um nýggi stórskjúttin hjá Sóljuni, Asta Petrauskiene og liðfelagar hennara fáa pilkað við favorittarnar úr Klaksvík.

Í Havn er Neistin – sum stríðist við Stjørnuna um silvurið - favorittur, tá tær í grannauppgerðini taka ímóti Kyndli. Eftir at Kyndil í gullárunum hevði takið á sigursvandu grannunum, so er alt aftur við tað gamla í Havnini nú, har Neistin aftur er best. Tað skerst tó ikki burtur, at í Kyndli er vanliga fatanin, at fólkið er nógv betri, enn stigatalvan sigur, og skal liðið eisini spæla í bestu deildini komandi ár, er skjótt neyðugt við stigum. Og tað verður neyvan betri enn tað sama, um okkurt av hesum kann koma við at taka eitt petti av silvurinum frá Neistanum.



*Í grannauppgerðini er Neistin greiður favorittur, men nú er skjótt lívsneyðugt hjá Kyndli at vinna sær stig*

# Veldst um stríðsviljan

**Manskappingin tykist í mangar mátar avgjørd, og tí verður tað helst viljin hjá ymsu liðunum, sum fer at verða avgerandi í komandi dystunum**

HONDBÓLTUR – MENN

*Jákup Mørk*

Eins og hjá kvinnunum, so spæla menninir fult umfar um vikuskiftið.

Ein av hesum dystum verður leygardagin, tá StÍF kemur á vitjan hjá H71, og einki er at ivast í, at strandingarnir eru favorittar móti hoyvíkingunum, sum tykjast fullkomuliga uppsteðgaðir.

Tað er tó soleiðis við strandingum, at tú ongan tíð veitst, hvar tú hevur teir. Tað tóktist tó so, at teir veruliga høvdu fingið glið á seinastu vikurnar, men so sýndu teir aftur vanliga mangulin upp á stabilitet, tá teir á heimavølli taptu móti KÍF, sum annars ikki hevði vunnið dyst í endaspælinum. Tað eru hoyvíkingarnir nú einsamallir um, og so er spurningurin, um teir fáa gjørt nakað við hetta, ella um stranindingar aftur fara at vísa seg frá síni bestu síðu.



*Strandingar koma á vitjan í Havn leygardagin, og so er spurningurin, frá hvørjari síðu teir vísa seg hesaferð*

### Kyndil koyrir á

Sunnudagin verður so grannauppgerð í Havn, tá Kyndil og Neistin hittast. Tó at Neistin er stórfavorittur at vinna dystin, so bendir nógv á, at hesin dysturin verður javnari enn teir báðir seinastu, tá Kyndil hevur verið greitt við undirlutan.

Seinastu vikurnar hava nevnliga víst eitt kyndilslið, sum veruliga er á veg fram. Moralurin er eftir øllum at døma í topp, og tó at liðið einki annað enn æruna hevur at spæla við, so hevur stríðsviljin ikki ligið eftir. Tað kann hugast, at tað sama ikki verður galdandi fyri Neistan, nú gullið er fokið, og silvurið tykist tryggjað.

Seinasti dysturin verður tann millum Tjaldur og KÍF. Orsakað av, at eingin niðurflyting er úr bestu mansdeildini, er hetta ein dystur, har hvørgin parturin hevur nakað at spæla fyri, og óstuðugu avrikini hjá báðum liðunum hava helst eisini borið boð um hetta. Hetta líkist tí einum fullkomuliga opnum dysti, har vinnarin verður tann, sum ígjøgnum teir 60 minuttirnar sýnir besta viljan til sigur.



# Hondbóltur í uppvísingarstíli

**Neistakvinnurnar, sum skipaðu fyri uppvísingardysti í hondbólti hóskvøldið, tóktust sjálvar ovfarnar av risa undirtøkuni, sum tiltakið fekk, og áskoðararnir fingu so sanniliga eisini nakað fyri pengarnar**

HONDBÓLTS-UPPVÍSING

*Jákup Mørk*

Nógv mál, tveir javnir dystir og fram um alt undirhald á einum rættiliga høgum støði. Hetta var tað, sum leikararnir høvdu at bjóða áskoðarunum, tá kvinnuliðið hjá Neistanum hóskvøldið skipaði fyri uppvísingardysti, har innkomni peningurin varð latin beinleiðis til vælgerandi endamál.

Og at nógvir føroyingar hava hug at stuðla vælgerandi endamálum, var enn eina ferð sjón fyri søgn í Høllini á Hálsi. Tá farið varð undir kvinnudystin, var høllin gott og væl hálvsett, og so við og við komu alt fleiri. Tá farast skuldi í holt við mannfólkadystin var at kalla ógjørligt at finna sær sitipláss, og ivaleyst kom góða undirtøkan eitt sindur óvart á fyrireikararnar. Í øllum førum var heilt skjótt, at mongu køkurnar í køkutombolainum vóru uppi, og hartil vórðu heilt nógvir lutaseðlar seldir til teir báðar dráttirnar, sum vórðu fyriskipaðir.

### Fingu nakað afturfyri

At mongu áskoðararnir so eisini fingu tveir fínar hondbóltsdystir, mundi so ikki gera kvøldið verri.

Í báðum var talan um bestu liðini hjá VÍF, sum royndu seg móti liðum, sum Dimmalætting og Sosialurin høvdu sett saman. Sonevnd pressulið.

Hjá kvinnuliðnum var tað eisini pressuliðið, sum pressaði mest fyrsta hálva tíman. Málini skolaðu inn aftan fyri VÍF-málverjan, og í mongum førum sá hetta somiki lætt út, at áskoðarin fór at ivast í, hví VÍF er so einaráðandi í kappingini. Eisini hóast hesin dysturin var móti bestu leikarunum hjá øllum hinum liðunum.

Í seinna hálvleiki kom tó vend í. VÍF tók seg saman, og í longum løtum vóru tað nú tær, sum stóðu fyri hondbóltsuppvísingini. 21-12 varð broytt til 23-23, og restina av dystinum leikaði javnt á, fram til Gunnleyg Berg í seinastu sekundunum gjørdi munin til tvey mál og harvið avgjørdi dystin.

### Málríkt

Hjá monnunum gjørdist endaliga støðan somuleiðis tann, at úrvalsliðið vann við tveimum málum. Sjálv dystargongdin her var tó munandi javnari, men hóast hetta, so høvdu flestu leikararnir bæði hug og dirvi til at royna ymsar snildir, tá fríspælingar og skotroyndir skuldu togast fram.

At úrvalsliðið var sett saman av nøkrum av størstu profilunum í landinum – í øllum førum hvat álopsspæli viðvíkur – viðførdi sjálvandi eisini, at málini gjørdust heilt nógv í tali, meðan denturin á verjuspælið hinvegin var heldur minni. Hetta gav tó málverjunum høvið at fremja nakrar framúrskarandi bjargingar, og ikki minst vóru tað hesar, sum eisini borgaðu fyri undirhaldinum.

Alt í alt var talan soleiðis um eitt sera gott hondbóltskvøld hjá mongu áskoðarunum, og vónandi kann hetta skapa íblástur til, at slíkir dystir eisini verða skipaðir framyvir. Hetta var veruliga toppurin í føroyskum hondbólti, og úrslitið av hesum lat seg heldur ikki fornokta.



*Hjá monnunum sýndi Bjarni Wardum, hví hann er ovastur á føroyska máltindinum. Her er hann enn einaferð í skotroynd*



*Lotte Sørensen og hinar úr pressuliðnum gjørdust fyrsta føroyska liðið í tvey ár, sum hevur vunnið dyst móti VÍF*



*Høgra ella vinstra. Hjá teimum bestu í landinum tykist hetta í summum førum at vera tað sama*



*Í báðum førum gjørdist talan um sera tættar dystir, har allir leikararnir offraðu seg væl meira, enn talan vanliga er um í slíkum stuttleikadystum*